# Send eina heilsan



Sosialurin bjóðar nógv lætt og hugnaligt tilfar her í jólamánaðinum, og her á hesum síðum gera vit serliga nógv burtur úr jólum við greinum, myndum og lýsingum.

Nógv verður gjørt burtur úr kring landið undan jólum. Jólafrokostarnir eru endaleysir í tali, og hungaløtur og jólahald er eisini nógv staðni. Summa staðin vitjar jólamaðurin við pakkum til tey smáu, og so hvørt jólini nærkast, verður helst dansa um jólatræ onkrastaðni eisini.

Sosialurin er við til nøkur tiltøk, sum eru í jólamánaðinum, men tað er vónleyst at verða allastaðni, nú so nógv er á skránni. Hinvegin kunnu fólk eisini hjálpa okkum við at dekka tað, sum gongur fyri seg áðrenn jól.

Um tit hava okkurt hugnaligt á skránni í skúlanum, í barnagarðinum ella aðrastaðni, eru tit vælkomin at senda okkum eina mynd frá hesum og greiða okkum frá, hvat myndin snýr seg um. Harvið kunnu tit fáa eina mynd av júst tykkara jólastákan við í jólatilfarið her í blaðnum.

Send myndina og tekstin til post@sosialurin.fo og skriva eisini navn á kontaktpersóni og telefon nummar.

























